Karlot Hergeirsson
løgtingsmaður

Nr. 22/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um Nólsoyarleiðina og aðrar leiðir hjá SSL, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Nær kann væntast, at nýggj ferja verður sett inn á Nólsoyar leiðina?
2. Verður arbeitt við at útvega eitt avloysaraskip, sum hevur á leið sama kapasitet sum Teistin / Ternan, inntil nýggj ferja kemur?
3. Hví er játtanin á Nólsoyarleiðini í uppskotinum til fíggjarlóg 819.000 kr. lægri í 2020 enn 2019?
4. Vil landstýrismaðurin útvega játtan, so at "eykamaðurin" kann vera umborð alla summarhálvuna, og ikki sum higartil uml. 2 mánaðir?
5. Vil landsstýrismaðurin bera so í bandi, at tað kemur ein túrur jólaaftanskvøld og ein túrur jólakvøld, so fólk sleppa til hús?

Viðmerkingar:

Samgonguskjalið tilskilar, at «Avgerandi fyri trivnaðin er eitt gott samferðslukervi har oyggjarnar verða knýttar saman. Tí verður ein samferðsluætlan gjørd, har íløgur í tunlar, undirsjóvartunlar, vegakervi og ferjur verða raðfestar innanfyri langtíðar løgukarmin». Her verða ferjur nevndar seinast, men vónandi er tað ikki soleiðis, landsstýrið hevur ætlan at raðfesta, altso ferjunar seinast og alt hitt fyrst, men hyggur ein í fíggjarlógauppskotið fyri 2020, so dugi eg ikki at síggja, at nøkur íløga er sett av til ferjur, ei heldur í 2021 og 2022. Tað er bara tað lítla avloysaraskipið, sum longu er í gerð, sum verður liðugt í mai 2020 (játtað í 2018 og 2019). Hetta skipið fer ikki at nøkta tann dagliga tørvin.

Á hvørjum ári eru vit komin langt inn í summarið, áðrenn "eykamaðurin" er settur umborð á Ternuna, so hon kann føra 294 ferðafólk í staðin fyri 95. Hetta ber í sær, at tað ofta kemur fyri, at Ternan ikki nøktar tørvin. Hetta hevur sera neiliga ávirkan á ferðavinnuna í oynni.

Tað er eitt stórt ynski hjá teimum, sum hava brúk fyri strandferðsluskipunum um jólini, at túratalið verður økt, soleiðis at familjur kunna halda jól saman, og hava møguleika at koma heim aftur til sín sjálvs um kvøldið. Skipini hjá SSL eru fult mannaði um høgtíðirnar.

Á Løgtingi, 19. november 2019

Karlot Hergeirsson